# – Vit hava sett hol á svullin

*- At vit fóru í arbeiðssteðg setti hol á ein stóran svull, sum nú blívur við at renna. Verður svullurin ikki tómur, verður hann ikki heilur aftur, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Lærarafelagnum*

Dagfinn Olsen

Arbeiðssteðgurin og blokadan heldur fram innan føroyska skúlaverkið. Føroya Lærarafelag kundi ikki góðtaka notatið, sum semingsmenninir royndu at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið við.

Semingsmenninir gera ikki meira í løtuni.

- Fyribils hava vit vrakað uppskotið og so gongur vikuskiftið, uttan at nakað hendir. Vit hava biðið um fund við Høgna Hoydal, landsstýrismann í skúlamálum. Vit vilja fegin tosa við hann um okkara sjónarmið, tí vit halda, at hann er ikki so væl kunnaður, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

**Skúlar lata aftur**

Søgur ganga um, at á mongum skúlum er støðan ikki góð og at talan er um, at skúlarnir brátt lata aftur. M.a. tí tænastumenninir, ið eru eftir í skúlunum, bert røkja uppgávurnar, ið eru kravdar eftir tænastumannalógini.

Elsa Birgitta Petersen veit einki ítøkiligt um hesi tíðindi, men hon skilir væl, um støðan er hættislig.

Vandi sigst vera fyri, at skúlar brátt lata aftur, tí allar uppgávur verða ikki røktar og einki verður keypt inn, so ymiskt byrjar at ganga undan.

- Eg havi verið úti í skúlanum og havi sæð, at t.d. teldustovur eru læstar. Hetta er jú eitt savn. Allar serstovur eru læstar. Amboð verða ikki lænt ímillum skúlar og heldur ikki t.d. svimjihylar, tí hetta er eisini savn ella serstova, sigur Elsa Birgitta Petersen og sipar til, at røkt av serstovum og søvnum er rakt av arbeiðssteðginum.

T.d. skúlakøkarnir eru enn virknir, tí har fáa lærarar reduktión og er hetta teirra skylda at røkja.

- Lærarar fáa gjáld fyri ávíst arbeiði. Tað skulu teir gera. Men at rudda upp og annað fáa teir einki fyri, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hon heldur, at øll nú duga at síggja, hvussu stóran týdning ein vælvirkandi fólkaskúli hevur.

- Næmingar, ið vit hava uppalt eftir nýmótans mynstri, tað vil siga at ábyrgd av egnum lívi, duga at síggja, at hetta gongur ikki. Teir einastu, ið ikki taka ábyrgd, eru politikarar.Teir taka ikki ábyrgdina av lógini, ið er smoygd yvir høvdið á okkum, sigur Elsa Birgitta Petersen.

**Vendi í Fíggjarmálastýrinum**

Hon vísir á, at politikarar hava sagt, at meira arbeiði fylgir við lógini.

- Undan hesi semingsroyndini setti Undirvísingar- og Mentamálastýrið upp tey 9 punktini, sum fevndu um meira álagt arbeiði. Tað fór í Fíggjarmálastýrið, har tað bleiv nógv reduserað, sigur Elsa Birgitta Petersen.

- Tá segði Signar á Brúnni, at vit skuldu fáa eitt skriv. Men hetta fór fyrst í Fíggjarmálastýrið. Har bleiv tað umarbeitt og síðani lagt fyri semingsmenninar.

*Var tað hetta, ið tit ikki kundu góðtaka?*

- Tað, sum nú kom, var so knapt og diktatoriskt orðað, at vit máttu siga, at soleiðis spæla vit ikki, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag.

**Víkuvís**

Fleiri feløg í grannalondum hava kunnað seg um støðuna hjá Føroya Lærarafelag og Danmarks Lærerforening hevur spurt seg fyri, um nakað er, ið tey kunnu hjálpa við.

Høvuðsskrivarin í NLS hevur verið á vitjan hjá Føroya Lærarafelag og hevur fingið kunning um støðuna. NLS er samskipan av skúlan í Norðurlondum - frá teim minstu upp til hægri skúlar.

- Vit hava saman orðað ymiskt, ið verður sent út til grannalondini. Um ein góðan mánað verður stjórnarfundur í NLS í Føroyum. Tað verður stuttligt, tá umboðini koma, og vit eru í arbeiðssteðgi, sigur Elsa Birgitta Petersen og dylur ikki, at tað er eingin trupulleiki at halda fram við arbeiðssteðginum í ein mánað afturat og at Lærarafelagið ikki ætlar at slaka.

Í blaðnum mikudagin varð eisini nevnt, at eftir at semja er funnin, skal henda til frumatkvøðu millum limir Føroya Lærarafelags og hetta kann taka eina viku.

**Hol sett á svull**

- At vit fóru í arbeiðssteðg setti hol á ein so stóran svull, sum nú blívur við at renna. Verður svullurin ikki tómur, verður hann ikki heilur aftur, sigur Elsa Birgitta Petersen, ið ikki metir, at nakað sum helst hendir um vikuskiftið.

# Gjørdust ikki nógv klókari

*Umboð fyri 32 fakfeløg gjørdu á fundi í Tinganesi greitt, at tey sita ikki og eygleiða á síðulinjuni leingi afturat*

Dagfinn Olsen

Vegna sonevnda 7 mannabólkin handaði Joan Ziskason hósdagin Høgna Hoydal skriv.

Tað var ein langur riðil av fakfelagsformonnum og umboðum, ið vildi hitta varaløgmann á máli, nú Føroya Lærarafelag hevur verið í arbeiðssteðgi síðani 8. mars 2000.

Í skrivinum til Høgna Hoydal, ið nú umsitur skúlamál, siga feløgini - umboðað av 7 mannabólkinum - at tey krevja, at landsstýrismaðurin tekur stig, so ein loysn fæst á málinum og samráðingar millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið byrja aftur. Kravt verður, at landsstýrismaðurin aktivt fer inn og finnur eina loysn á trætuni.

7 mannabólkurin ger vart við í skrivinum, at landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av, at øll børn ganga í skúla. Nýggja fólkaskúlalógin áleggur lærarum ein part av uppalingini av børnunum, men sum støðan er í dag, mala børnini fyri vág og vind og kann hetta fáa álvarsligar fylgir, verður sagt.



*Joan Ziskason handaði vegna 32 fakfeløg Høgna Hoydal skriv. Mynd: Jens Kristian Vang*

Í skrivinum verður átala, at nýggj lóg er samtykt, sum viðførur meirútreiðslur og at hetta átti at verið mál millum Fíggarmálastýrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið, men er nú endað í sáttmálasamráðingunum við Føroya Lærarafelag.

Fakfeløgini minna á útsenda yvirlýsing og siga, at tey kenna sína vitjanartíð og ætla ikki at sita sum eygleiðarar á síðulinjuni leingi afturat.

**Ikki nógv klókari**

Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelagnum og umboð í 7 mannabólkinum, sigur, at tey á fundinum løgdu síni sjónarmið fram og handaðu Høgna Hoydal skrivið.

Feløgini fingu tó ikki so nógv at vita frá Høgna Hoydal.

Joan Ziskason sigur, at hann minti á, at Føroya Lærarafelag skal samráðast við Fíggjarmálastýrið um lønir og síðani skal restin fyri Undirvísngar- og Mentamálastýrið.

Joan Ziskason minnir á, at Lærarafelagið hevur sagt, at har er tey tí áskoðan, at fáa tey ikki bøtt viðurskiftini nú, so verður tað ikki.

Joan Ziskason metir ikki, at fakfelagsumboðini gjørdust so nógv klókari úti í Tinganesi. Heldur var talan um sama orðavavstur, sum á politiska pallinum.

Joan Ziskason vil ikki siga nakað ítøkiligt, hvørt feløgini hugsa um stuðulstiltøk, men vísir til skrivið til Høgna Hoydal, ið hon metir ikki krevur tær stóru tulkingarnar.

# Illgitingar um stuðulssvans

*Ungmannafelagið Tjóðveldið og FUR avsanna, at tey hava ov langar limalistar fyri at fáa størri stuðul frá veddingartænastuni*

Høgni Mohr

Ókendar røddir vilja vera við, at øll ungmannafeløgini í Føroyum, uttan unga sambandið, hava verið ov djúpt í kassanum hjá donsku veddingartænastuni. Nevnd verða feløg sum Unga Tjóðveldið, Sosialistiskt Ungmannafelag og FUR.

Keldurnar hava róð fram undir, at føroysku feløgini nýta sama hátt, sum donsk ungmannafeløg hava nýtt til tess at fáa meira stuðulskrónur úr vedddingarkassanum, enn tey høvdu rætt til.

**Skipað svans í Danmørk**

Í Danmørk kom hetta fram fyri nøkrum árum síðani, og burtur úr tí spurdist mikið rok. M.o. vórðu Venstres Ungdom, DSU, RU og Mellemfolkeligt Samvirke sett í samband við skipaða svansið.

Limalistarnir á ungmannafeløgunum í Danmørk vóru alt ov langir. Á teimum vóru nøvn á fólki, sum als ikki vóru limir; summi teirra tí tey vóru væl og virðiliga farin undir grønutorvu. Soleiðis fingu feløgini størri stuðul, tí jú longri listarnir vóru, jú fleiri krónur fullu í fangið á danska ungdóminum. Tað er hetta, sum leysasøgur nú vilja vera við, fer fram í Føroyum.

**Avnokta alt**

Men á Føroya Ungdómsráði standa tey sum kánus. Aðalskrivarin, Kári Olsen ger púra greitt, at alt er farið rætt fram.

Eisini leiðarin í Unga Tjóðveldinum, Annlis Bjarkhamar, staðfestir, at leysasøgurnar eru burturvið.

- Okkara framferðarháttur er tann, at statsgóðkendur grannskoðari góðkennir limalistan, sum er grundarlagið undir stuðlinum, sum FUR umsitur. Tað hevði verið politiskt sjálvmorð at svansa við limatølunum. Eg kenni limalistan hjá okkum, og eg kann upplýsa, at í sambandi við okkara stuðulsumsókn er skrásetta limatalið bert125. Hetta hóast vit hava 300 limir. Orsøkin til lægra talið á stuðulslimalistanum er, at nøvnini á limum, sum ikki hava latið fullfíggjaðar upplýsingar inn um seg sjálvar, ikki eru við, sigur Annlis Bjarkhamar, sum ger púra greitt, at er nakað ivamál um stuðulin, so ætlar Unga Tjóðveldi ikki at taka ímóti krónum frá donsku veddingartænastuni

**FUR fingið Grannskoðaraváttan**

Aðalskrivarin í FUR, Kári Olsen, staðfestir, at alt hjá Unga Tjóðveldinum er í fínasta lagi.

- Vit hava fingið upplýsingar um limatalið hjá politisku ungmannafeløgunum frá grannskoðara, og soleiðis skal tað vera, sigur hann og leggur aftur at, at skipanin í sambandi við stuðulsumsóknir er púra greið.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerkingar frá øðrum ungmannafeløgum áðrenn evstamark.



# Skiparin á Norrønu skelkaður

*–Norrøna hevur gullrein trygdarpappír, so eg fati ikki, hvussu sigur Ólavur Hovsgarð, skipari á Norrønu*



*– Trygdin á Norrønu er avgjørt ílagi, sigur Ib Mathisen yvirskipainspektørur á Søfartsstyrelsen. Ólavur Hovsgarð, skipari á Norrønu skilir onki*

Áki Bertholdsen

– Eg skilji púra onki av hesum.

Ólavur Hovsgarð, skipari á Norrønu, er milt sagt skelkaður av tíðindunum frá Søfartsstyrelsen í gjár um tað vánaligu trygdina umborð á Norrønu.

Í hesi vikuni hevur Søfartsstyrelsen almannakunngjørt ársfrágreiðingina fyri 1999, og har fær Norrøna vánaligt skoðsmál fyri trygdina.

Í hesum føri eru tað úrslitið av brunavenjingunum, sum hugsað verður um.

Søfartsstyrelsen hevur kannað Norrønu 10. mai í fjør og hvat brunatrygdini viðvíkur, fær Norrøna tað vánaligasta ummælið, sum hugsast kann.

Á einum skala frá 0-10 fær Norrøna nevniliga eitt snøgt 0 fyri brunavenjingarnar.

Søfarsstyrelsen hevur eisini kannað fimm onnur, føroysk ferðamannaskip.

Av teimum fær Strandfaraskipið Pride eisini eitt runt 0 frá Søfarsstyrelsen fyri brunavenjingar, og Dúgvan fær eitt fýratal.

Hinvegin fær Tróndur 9, Sam fær 8 og Smyril fær 7.

Søfartsstyrelsen sigur, at skoðsmálið frá 6-10 er nøktandi, frá 3-5 er minni gott og 0-2 er ikki nøktandi.

**Hava gullrein pappír**

Tað er skiparin, sum hevur ábyrgdina av trygdina.

Og ein av skiparunun á Norrønu, Ólavur Hovsgarð skili ikki, hvussu tað ber til, at Norrøna fær so ringt skoðsmál.

– Vit hava gullrein trygdarpappír. Tað merkir at Norrøna hevur allar góðkenningar, sum hon skal hava.

Men hann heldur avgjørt, at er trygdin umborð á Norrønu ikki ílagi, átti Søfartsstyrelsen heilt einfalt at gjørt álvara av og lagt skipið.

– Tí tað er avgjørt eitt mál, sum Søfartsstyrelsen eigur at taka sær av.

Ólavur Hovsgarð sigur, at norska skipasýnið hevur eisini verið umborð á Norrønu og kannað allar trygdarskipaninar og alt skipið annars, og teir høvdu ongar viðmerkingar.

Skiparin sigur, at tað er álvarsligt fyri Norrønu og Smyril Line, at Søfartsstyrelsen sleppur slíkum tíðindum út, tí tað kann fáa avleiðingar fyri umdømið hjá Norrønu.

Og hann heldur eisini ,at hetta hetta kann ikki fara aftur við borðinum óátalað.

Men akkurát, hvat verður gjørt við tað, veit hann ikki.

**Tríggjar venjingar**

Ólavur Hovsgarð sigur, at tað, sum kann vera hent, er, at tað var tann 10. mai í fjør, at Søfartsstyrelsen var umborð og gjøgnumgekk tær ymsu trygdarskipanirnar saman við manningini.

– Hetta var fimm dagar áðrenn summarsiglingin byrjaði og tað var spildurnýggj manning umborð og hon var sjálvandi ikki von við skipið tá.

Men skiparin sigur, at tá ið summarsiglingin byrjar, og nýggj manning kemur umborð, er eitt tað fyrsta tey gera, at gjøgnumganga trygdarskipanirnar, so at hvør veit, hvat hann, ella hon skal gera, um neyðstøða tekur seg upp. Tann fyrsti dagurin er settur av, allur sum hann er, til venjingar.

– Hedna eina dagin uppundir summarsiglingina, hava vit ikki færri enn tríggar venjingar við manningini fyri at tað ongin ivi skal vera um nakað sum helst.

Síðani hava vit fullar venjingar einaferð um vikuna fyri at halda alt viðlíka.

– Og tað er meiri enn donsk skip gera, tí tey hava bara venjingar einaferð um mánaðin.

Hann sigur eisini, at hevur Søfartsstyrelsen nakað at finnast at, plagar tað at krevja „umroynd“.

Óalvur Hovsgarð sigur, at Søfarsstyrelsen var eisini umborð seinasta summar og gav Norrønu ISM-Góðkenning.

ISM stendur fyri International Safety Management og tað er ein altjóða trygdargóðkenning.

– Tað átti Søfartsstyrelsen eisini at almannakunngjørt

– Men at Søfartsstyrelsen almannakunngerð slíkar upplýsingar, uttan víðari, er uttanfyri alt mark, heldur Ólavur Hovsgarð.

**Nýggjar venjingar**

Ib Mathisen Yvirskipainspektørur á Søfartsstyrelsen, sigur, at vit skulu vera varin við at koma til alt ov víttfevndar niðurstøður av hesum eftirlitinum hjá Skipasýninum.

– Hetta merkir avgjørt ikki, at tað eru óráð at sigla við Norrønu.

– Tað, sum skoðsmálið frá Søfarststyelse merkir, er, at henda ávísa dagin var brunavenjingin á Norrønu avgjørt ikki nøktandi.

– Og í slíkum førum krevja vit, umroynd og tað er eisini gjørt í hesum førum.

– Og tær venjingar, sum vit síðani hava havt eftirlit við umborð á Norrønu, hava verið nøktandi, sigur Ib Mathisen.

# Merkisdagur í landbúnaðarsøguni

Høgni Mohr

Í dag, 1. apríl, verður MBM 20 ár. Í tí sambandinum verður skipað fyri móttøku á MBM í Hoyvík. Opið verður millum klokkan 13 og 16.

Hendan sama merkisdag leggur ein av undangongumonnunum í lutafelagnum, MBM, frá sær sum bóndi. Tað er bóndin á Hoyvíksgarði, Hanus Vang, sum letur festið upp í hendurnar á fýraogtjúgu ára gamla systursoninum, Sigerti Paturson.

Eisini á Hoyvíksgarði verður móttøka. Millum klokkan 17 og 20.30 eru fólk vælkomin niðan á Vatnaskørð at heilsa upp á fráfarandi festaran og unga eftirmannin. Í hjallinum og í túninum verða ein snapsur ella ein bjór bjóðað. Men eisini til teirra, ið ikki bera sterkt í sín munn, verður okkurt flótandi, frættist av Hoyvíksgarði.





GSM frá Føroya Tele

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Vanligt hald
Til teirra, sum sjálvi ynskja at seta haldið saman við teimum tænastum, sum eru til taks, og har nýtslan er javnt býtt millum dag og kvøld. Við vanligum haldi kanst tú m.a. senda SMS-tekstboð.

| Kostnaður fyri vanligt hald | |
|---|---|
| Stovning | 500,00 kr. |
| Mánaðargjald | 115,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 2,40 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,40 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo